Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Súsanna Bertholdsen, løgtingsmaður

Svarari: Sirið Stenberg, landsstýrismaður í almanna- og mentamálum

Evni: Sjúkradagpengar til tímalønt

Spurningar:

1. Er gongd sett á arbeiðið at endurskoða sjúkradagpeningaskipanina til tímalønt?
2. Heldur landsstýrismaðurin, at tað er nøktandi, at eitt arbeiðsfólk fær útgoldið í mesta lagi 80% av eini arbeiðsmannaløn um mánaðin at liva fyri, tá sjúka rakar?

Í fjør bleiv sjúkradagpeningalógin broytt, og fleiri góðar broytingar vórðu gjørdar, men enn eru stórar avbjóðingar við skipanini, og stendur tað í samgonguskjalinum, at sjúkradagpeningaskipanin skal endurskoðast.

Lógin tekur ikki hædd fyri, at tímalønt eru ein fjølbroyttur hópur. Tímalønt starvsfólk, ið gerast sjúk, verða ofta illa fyri fíggjarliga, tí sjúkradagpeningaskipanin tekur ikki hædd fyri óstøðugum arbeiði, sum vit síggja tað í føroysku fiskivinnuni. At arbeiða á einum flakavirki er óforútsigiligt; bæði viðvíkjandi arbeiðstímum og inntøku um vikuna.

Er eitt starvsfólk á einum flakavirki í tí støðu, at sjúka rakar, so verður útgjaldið roknað eftir inntøkuni 5 vikur frammanundan. Hevur lítið arbeiðið verið tær 5 vikurnar, so verður útgjaldið til viðkomandi frá sjúkradagpeningaskipanini hareftir, so umframt at hava sjúku at dragast við, skal viðkomandi eisini stúra um fíggjarstøðuna.

Fyri at fáa greiðu á, hvørja ætlan landsstýrismaðurin hevur viðvíkjandi dagpeningaskipanini, verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 19. juni 2023

Súsanna Bertholdsen, løgtingsmaður